## Jólaheilsanir á Portalinum

Um jólini letur portal.fo útisetar senda jólaheilsanir heim og greiða frá, hvar tey eru stødd á jólum, og hvussu tey fara at halda jól í ár. Sendið jólaheilsanina til jol@sosialurin.fo, ella farið inn á portalin og trýstið á leinkjuna, sum eitur "sendið okkum eina jólaheilsan". Heilsanirnar verða lagdar út á portalin, so hvørt tær koma inn. Í teldupostinum skalt tú greiða frá, hvar tú ella tit eru stødd, og hvussu tit halda jól. Her ber til dømis til at nevna, hvat tit fara at eta, um tit hava jólatræ ella annað, ið hoyrir jólunum til. Telduposturin eigur at vera í mesta lagi 1500 tekn íroknað millumrúm. Sendið eisini eina mynd av tykkum. Myndin skal vera á leið 600 x 600 pixels og formatið skal verða jpg. Heilsanirnar verða lagdar á portal.fo øll jólini.



## Guðrun Sólja konsertir á Tvøroyri

Ímillum jól og nýggjár fer Guðrun Sólja Jacobsen at hava konsertir í heimbygdini Tvøroyri. Nú er langt síðani, at føroyingar hava havt møguleika at hoyrt Guðrun Sólju Jacobsen. Guðrun, sum nú er búsitandi í Danmark, hevur havt fleiri framførðslur har. Men nú Guðrun er komin heim í jólaferiu, fáa føroyingar so aftur ágóðan av vøkru røddini. Sunnudagin 28. desember hevur hon nevniliga konsert á Seglloftinum í heimbygdini Tvøroyri. Við sær hevur hon Neil Joensen á guitar og Dagfinn Olsen á bass.



*Í alt eru níggju samkomur í Havnini um tiltakið, sum verður í Badmintonhøllini nýggjársnátt frá klokkan 01*

*Mynd: Bergur Johannesen*

# Níggju samkomur standa saman á nýggjárinum

**Nýggjarsnátt komandi ár verður skipað fyri einum stórum tiltaki í Badmintonhøllini. Tað eru í alt níggju samkomur í Havnini, sum standa saman um at fyrireika tað. Lív Johannesen, ið er stigtakari, sigur at tey vænta áleið 400 fólk**

**Tiltakið**
**Nýtt 09**
**verður 1. januar í Badmintonhøllini í Havn. Dyrnar lata upp klokkan 00:30 og tiltakið byrjar klokkan 01:00. Øll eru vælkomin.**

NÝGGJÁRSHALD
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Í ár verður skipað fyri einum øðrvísi nýggjárstiltaki. Tað eru samkomurnar: Kirkju- og missiónshúsið á Argjum, Ebenezer, Evangeliihúsið, Hebron, Meinigheitshúsið, Lívdin, Oasan, Filadelfia og Frelsunar Herurin, ið standa fyri stóra tiltakinum, sum verður í Badmintonhøllini.

Stigtakarin til tiltakið er 20 ára gamla Lív Johannesen, sum býr í Havn, men er úr Lamba.

- Eg havi ligið inni við hugskotinum síðan eg var 14 ár, møguleikin at skipa fyri einum slíkum tiltakið hevur ikki verið til staða fyrr enn í ár. Onnur ár havi eg roynt at samskipa samkomurnar inni á Skálafjørðinum, men ongantíð hava umstøðurnar loyvt einum slíkum tiltaki. Seinasta ár var hon á bibliuskúla í Afrika og hugsaði, í ár skal tað verða. Hon setti seg í sambandi við omanfyrinevndu samkomur og hugskotið fekk beinavegin góða undirtøku.

### Nýggjárið

Nógv ymiskt verður sett í samband við at hátíðarhalda byrjanina av einum nýggjum ári, men skráin á sokallaða Nýtt 09, sum nýggjárstiltakið kallast, er eitt sindur øðrvísi, men fjølbroytt, so øll fáa nakað burturúr. Lív Johannesen greiðir frá, at karmarnir vera hugnaligir og øll kunnu koma innum at hugna sær. Ein stór lovsongsløta verður, andakt, tónleikaframførsla við Martini í Grund og Jóhan Dalsgarð, eisini kallaður Jóhan í Kollafirði, kemur at undirhalda.

Umframt hetta verður fresk uppa eisini at fáa ókeypis. Til ber at keypa ymiskar aðrar vørur í hugnaligu caféini, sum verður í frítíðarskúlanum, sum eisini er í høllini.

Orsøkin til Badmintonhøllin varð vald at hýsa tiltakinum er, at hon er perfekt á allar mátar, greiðir Lív Johannesen frá.

- Badmintonhøllin liggur næstan mitt í býnum, umstøðurnar at fyrireika eru av teimum bestu, tí ein stórur køkur er í niðaru hæddini og hølini hjá frítíðarskúlanum kunnu nýtast til caféina, sum er eitt sindur burtur frá lovsongsløtuni. Høllin er stór, so hon rúmar nokk øllum, ið ynskja at vera við. Við at nýta Badmintonhøllina møtast allar samkomurnar á jøvnum føti, tí eingin eigur bygningin.

### Endamálið

Endamálið við tiltakinum Nýtt 09, sigur Lív Johannesen, er at sameina samkomurnar í samstarvi, gera karmar fyri at fólk kunnu byrja nýggja árið saman á ein uppbyggiligan hátt og so øll kunnu samlast og njóta byrjanina av nýggja árinum í einum hugnaligum umhvørvi.



*Stigtakarin Lív Johannesen hevur havt tiltakið í huganum í seks ár, og í ár savnast samkomurnar í Havnini fyri at skipa fyri tí.*

*Mynd: Bergur Johannesen*